Skjal P

Kappingareftirlitið

Vinnunevnd Løgtingsins

Tórshavn 20. Juni 2017

**Viðmerkingar til Løgtingsmál nr. 142/2016 Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**

Fiskur er eitt avmarkað tilfeingi, og tá hevur reguleringin stóran týdning fyri, hvussu effektiv nýtslan av tilfeinginum verður. Kappingareftirlitið hevur nakrar viðmerkingar til, hvussu fiskivinnan eftir ætlan skal fyrisitast eftir hesum lógaruppskoti. Kappingareftirlitið hevur eisini nakrar viðmerkingar til anti-trust reglurnar, tí her er talan um kappingarreglur, sum umskara reglurnar í Kappingarlógini.

**1. Fiskivinnureguleringin**

Í §2 í lógaruppskotinum stendur, at endamálið við lógini er at tryggja eina lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygga gagnnýtslu av livandi tilfeinginum í sjónum, at varveita sjófeingið sum ogn føroya fólks, at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkasti frá fiskivinnuni, og at stuðla undir arbeiðsmøguleikar, inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið. Víðari í greinini verður sagt, at lógin skal fyrisitast soleiðis, at mest møgulig virðisøking fer fram, at hon kemur vinnuni og føroyska búskapinum til góðar, at øll fáa javnbjóðis atgongd til vinnuna, og at atgongdin til tilfeingið verður býtt á ein hátt, sum gagnar øllum pørtum av landinum.

Fleiri av hesum endamálum eru í andsøgn, men sambært viðmerkingunum til §2 verður hetta ikki ein trupulleiki, tí tá ið avtornar er hetta ein spurningur um, hvussu endamálini verða raðfest politiskt, og um hvørjar fyriskipanir og stýringsamboð Fiskimálaráðið til eina og hvørja tíð velur at leggja dent á.

Í grundini er talan um eina meir ella minni orðrætta endurtøka av endamálsorðingini í galdandi lóg um vinnuligan fiskiskap, og viðmerkingarnar til §2 kundu týtt uppá, at ætlanin er at løgting og landsstýri framvegis skal hava ein rættuliga virknan leiklut í umsitingini av fiskiríkidøminum.

Tað verður sagt §2 at ongin vinna verður stýrd við endamálsorðingini. Tað er rætt, men hinvegin so eru hesar stýrandi fyri hvørjar aðrar ásetingar eru í lógini. Tað framgongur eisini av restini av lógaruppskotinum, at ætlanin er framhaldandi at umsita í smálutir, heldur enn at skapa yvirskipaðar karmar. Samfelagsligar avbjóðingar, so sum fráflytingin frá ávísum pørtum av samfelagnum, skula eftir ætlan loysast umvegis fiskivinnulóggávuna. Somuleiðis framgongur av lógaruppskotinum at ynski er at fiskivinnan skal stýrast soleiðis, at hon er so arbeiðsskapandi sum møguligt, hóast tað at ein vinna er arbeiðsintensiv ikki í sjálvum sær merkir, at hon er mest møguliga virðisskapandi. Lóggivið verður sostatt um sjálvt vinnumynstri, og kann hetta hava við sær at fiskivinnan verður fasthildin í einum ineffektivium vinnumynstri.

Orsøkin til at neyðugt er við eini nýskipan av fiskivinnuni, er at almenni leikluturin, sum umsitari av náturutilfeinginum, hevur ikki verið nøktandi. Uttan mun til um talan er um kvotur ella fiskidagar, so er aðaluppgávan hjá landinum, at tryggja at yvirfisking ikki fer fram, men niðurstøðan eftir meira enn 20 ár við lógini um vinnuligan fiskiskap er, at landið megnaði ikki at tillaga veiðitrýstið til eitt støði, soleiðis at veiðan gjørdist lívfrøðiliga burðadygg. Hetta er ein ábending um, at tað ber ikki til at umsita á hendan hátt, tí lívfrøðiligu langtíðaratlitini sýnast altíð at skula víkja fyri øðrum stutttíðar atlitum.

Ein skipan sum tryggjar lívfrøðiliga tilfeingið, men annars letur fiskivinnuna tillaga seg eftir umstøðunum, er tað, sum gevur størst møguligt avkast av fólksins ogn. Samfelagsligir ójavnar og aðrar skeivleikar sum løgtingi ynskir at taka atlit til , kunna bøtast umvegis skattaskipan og aðrar skipanir.

## 1.1. Umsitingarætlanir

Í §25 í lógaruppskotinum er ásett, at umsitingarætlan skal gerast fyri hvønn fiskastovn grundað á eina meginreglu um lívfrøðiliga burðardygga veiðu. Tó verður eisini sagt, at onnur atlit skulu takast, t.d. til stabilitetin hjá fiskivinnuni. Ætlanin er síðani, at landsstýrisfólkið í fiskivinnumálum skal leggja umsitingarætlanina fyri løgtingið til góðkenningar. Hvussu húsast skal innanfyri umsitingarætlanina verður upp til landsstýrisfólkið.

Kappingareftirlitið metir, at ein skipan eftir §25 hevur somu veikleikar sum verandi skipan, har veiðan verður ásett eftir tilráðingum frá Havstovuni og Fiskidaganevndini. Tankin við báðum skipanum er, at tað skal bera til at finna eina gylta javnvág millum lívfrøðiliga burðardygga gagnnýtslu og stutttíðaráhugamál í fiskivinnuni. Tað hevur víst seg undir verandi skipan, at tilráðingarnar frá Havstovuni ongantíð enn eru fylgdar heilt, tvs. at síðani lógin um vinnuligan fiskiskap kom í gildið, hevur av eini og hvørjari orsøk altíð verið neyðugt at taka serligt atlit til fiskivinnuna. Av somu orsøk er tillagingin av fiskivinnuni farin ov seint fram.

Trupulleikin er, at tað eru altíð orsøkir til at vísa fiskivinnuni atlit. Rávøru grundarlagið sveiggjar, oljuprísir sveiggja, og marknaðarprísurin kann somuleiðis sveiggja. Nær sveiggjar ov nógv til at neyðugt er at vísa atlit? Nær er talan um eitt sveiggj, og nær er talan um eina endaliga broyting, har ongantíð verður vent aftur til upprunaligu støðuna? Tað eru fleiri royndir gjørdar við skipanum, sum skuldu uppviga sveiggj av ymiskum slag, men hevur hetta sjáldan eydnast væl.

Allar vinnur hava skiftandi umstøður at virka undir. Tað er tí undrunarvert, at neyðugt skal vera at áseta hvussu nógv kann veiðast á hendan hátt. Fiskivinnan verður eisini rakt av skiftandi oljuprísum og skiftandi søluprísum. Er ætlanin at loyva hægri veiðu enn lívfrøðiliga er ráðiligt, tá ið oljuprísirnir hækkað ella søluprísirnir lækkað?

Í Føroyum hava vit eisini alivinnu, ið sum kunnugt eisini brúkar eitt avmarkað tilfeingi. Innan alivinnuna er tað Umhvørvisstovan, sum tekur avgerð um, hvussu nógv kann alast á einum alioki. Ongin onnur atlit verða tikin enn til umhvørvið. Avgerðir um hvat skal henda, um ábendingar eru um sjúku, liggja hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Avgerðirnar hjá Umhvørvisstovuni og Heilsufrøðiligu Starvstovuni skulu ikki gjøgnum politiska góðkenning. Talan er um bundnar uppgávur, sum byggja á vísindaligt arbeiði, og Vinnumálaráðið hevur umsjón við hesum stovnum, men tekur ikki lut í málsviðgerð.

Kappingareftirlitið metir, at tað hevði verið skynsamari, um umsitingarætlanirnar eftir §25 einans bygdu á lívfrøðiligar metingar, og atlit ikki vórðu tikin til vinnuna. Tað er tann lívfrøðiliga burðadygga gagnnýtslan, sum gevur størst møguligt langtíðar avkast til føroyska samfelagið. At taka atlit til "stabilitetin" í fiskivinnuni merkir bara, at tey feløg, sum klára seg ringast í vinnuni, fáa ein stuðul frá landinum at halda fram í vinnuni. Landið missir við hesum tað virðisskapan sum hevði verið, um fiskað var lívfrøðiliga burðadygt.

## 1.2. Bygnaðarlig viðurskifti

Fiskivinna sum málsøki hevur ta serliga eyðkenni, at Fiskimálaráðið hevur ein sera virknan umsitingarligan leiklut, tí ráðið situr við sjálvari loyvisumsitingini, og hevur eisini ein virknan leiklut í sambandi við ásetan av árligu veiðuni. Hetta hevur givið landsstýrisfólkinum í fiskivinnumálum eina serliga støðu.

Tað eru yvirhøvur tveir trupulleikar, sum hava serliga góð gróðrarlíkindi, tá eitt aðalráð hevur ein virknan umsitingarligan leiklut í sambandi við vinnulóggávu.

Í fyrsta lagi skapar hetta serliga góðar umstøður fyri klientismu, ið er ein skipan har atkvøður ella flokkstuðul verður latin afturfyri politiskar ella umsitingarligar avgerðir. Samfelagsfrøðingurin Kristoffur Laksá hevur í síni masterritgerð um føroyskan vinnupolitik seinastu 60 árini m.a. kannað hesi viðurskifti, og er komin fram til, at fyritreytirnar fyri klientismu eru til staðar í fiskivinnuni. Millum annað hevur samfelagsfrøðingurin havt samrøður við reiðarar, sum siga, at neyðugt er við nógvum samskifti við landsstýrisfólkið í fiskivinnumálum, tí hesir eru allatíðina í eini ótryggari støðu, har teir ikki vita, um teir fáa tey rættindi, teir hava biðið um[1].

Í øðrum lagi skapar hetta góðar umstøður fyri policy capture[2], ið vanliga verður lýst sum eitt úrslit ella ein tilgongd har avgerðir viðvíkjandi lóggávu v.m. áhaldandi og afturvendandi verða førkaðar burtur frá tí sum gagnar almenninginum til heldur at gagna einum avmarkaðum skarða. Hetta hendir eitt nú umvegis lobbyvirksemi frá vinnuni, sum í sær sjálvum er lógligt og í flestu førum eisini í lagi, men policy capture hendir serliga, tá ið bert ein partur hevur atgongd til ávirkan, og tá ið onki gjøgnumskygni er í sjálvari tilgongdini. Júst henda støðan er til staðar, tá ið sama aðalráð sum skal hava umsjón við økinum og hevur natúrliga sambandi við fiskivinna, eisini tekur sær av loyvisumsiting og ásetan av veiðu.

Fyri at tryggja fiskivinnuni góðar karmar at virka undir, og fyri at tryggja at fiskiríkidømi verður umsitið á ein hátt sum gagnar almenninginum, er neyðugt, at uppgávurnar viðvíkjandi loyvum og ásetan av mest loyvdu veiðu verður skipað eftir einum leisti, sum byggir á opinleika og greið og objektiv krøv. Ein royndur leistur er, at uppgávurnar viðvíkjandi ásetan av veiðu og loyvum verða lagdar til stovnar, sum í málsviðgerðini í einstøkum málum eru óheftir av aðalráðnum.

Stovnarnir skulu arbeiða eftir lóggávu sum løgtingið setur fyri teir. Fiskimálaráðið skal hava umsjón við stovnunum, men skal ikki hava ein virknan leiklut í sambandi við ásetan av mest loyvdu veiðu og í sambandi við loyvisgevan.

### 1.3. Anti-trust reglur

Reglurnar í kapitul 5 í kappingarlógini um samanleggingareftirlit eru galdandi í fiskivinnuni saman við reglunum um anti-trust í galdandi lóg um vinnuligan fiskiskap, og verða eisini galdandi fyri fiskivinnuna um fyriliggjandi lógaruppskot kemur í gildið.

Ein týðandi táttur í lógaruppskotinum er avmarking í miðsavnan av veiðirættindum. Ávísar broytingar er gjørdar hesum viðvíkjandi meðan politiska skipanin hevur arbeitt við lógaruppskotinum. Markið fyri miðsavning innan øll veiðirættindi, sum Føroyar hava, verður 17,5% og ikki 12%. Somuleiðis eru miðsavningsreglurnar broyttar soleiðis, at nú verður ikki eitt miðsavningsprocent sett fyri hvørt økið. Í

---

[1] Kristoffur Laksá, : Klientilisma í føroyskum vinnupolitikki: Rættindi fyri atkvøður, Frøði, 1/2014, síða 5.
[2] OECD Preventing Policy Capture - Integrity in Public Decision Making, Published on March 30, 2017

staðin verður eitt miðsavningsprocent sett fyri trý høvuðsøkir. Talvan niðanfyri vísir uttast til høgru upprunaligu evstumørkini fyri miðsavning í lógaruppskotinum, og vinstru megin evstumørkini sambært nýggju semjuna hjá samgonguni.

| Semja | Mark | Lógaruppskot (§6) | Mark |
|---|---|---|---|
| Evsta mark | 17,5% | Øll veiðirættindi sum Føroyar hava, tó við ávísum undantøkum. | 12% |
| Uppsjóvarfisk | 20% | Makrelur í Norðuratlantshavi | 15% |
| | | Svarkjaftur í Norðuratlantshavi | 15% |
| | | Norðhavssild | 15% |
| Botnfisk undir Føroyum | 20% | Toskur í føroyskum sjógvi | 15% |
| | | Hýsa í føroyskum sjógvi | 15% |
| | | Upsi í føroyskum sjógvi | 15% |
| | | Kongafiskur í føroyskum sjógvi | 20% |
| | | Svartkalvi í føroyskum sjógvi | 20% |
| | | Fiskiskapur við gørnum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi | 20% |
| Fiskiskapur á fjarleiðum | 20% | Botnfiskur í russiskum og norskum sjógvi og við Svalbard | 25% |
| | | Botnfiskur í Íslandi, í NAFO og í Grønlandi | 20% |
| | | Kongafiskur í altjóða sjógvi, NEAFC skipanarøkið | 35% |
| | | Rækjufiskiskapur í Norðuratlantshavi | 35% |

Tað framgongur av almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, at reglurnar um miðsavning hava tvey atlit. Í fyrsta lagi umvegis kapping at tryggja eina effektiva vinnu, og í øðrum lagi at umganga, at valdið verður savnað á fáum hondum.

Viðvíkjandi seinna atlitinum verður víst til, at um maktin í fiskivinnuni verður savnað á fáum hondum, so kann tað hava við sær, at valdið yvir vinnulívinum somuleiðis verður savnað á fáum hondum, og politiska skipanin kann verða ávirkað til at taka avgerðir, sum ikki eru til gagns fyri samfelagið sum heild. Kappingareftirlitið metir at tað hevði verið betur, um onnur tiltøk vóru sett í verk fyri at mótvirka hesum, heldur enn at brúka fiskivinnulóggávuna til tað. Millum annað er víst á omanfyri, at um arbeiðsbýtið viðvíkjandi loyvum og veiðu verður deilt millum aðalráð og undirliggjandi stovnar, so kunnu nakrir av trupulleikunum minkast. Afturat hesum kunnu reglur setast í verk um lobbyvirksemi og gjøgnumskygni.

Viðvíkjandi fyrra atlitinum – tað at tryggja eina effektiva vinnu umvegis kapping, so er ein grundleggjandi munur á, hvussu Kappingareftirlitið arbeiðir, tá ið metast skal um miðsavning, og tann arbeiðishátt sum verður lagt upp til í lóggávuni, og sum eisini er at finna í galdandi lóggávu.

Í uppskotinum verða sett endalig mørk fyri, hvussu nógv feløg kunnu eiga í føroysku fiskivinnuni. Mørkini eru ikki sett við støði í teimum royndum, man hevur havt í sambandi við fyrisitingina av fiskivinnuni, og okkum kunnugt liggur heldur ikki nøkur búskaparlig greining handan mørkini. Mørkini eru sett politiskt.

Tað skal tó fyrst viðmerkjast, at tað er ikki eyðsæð at ein miðsavning av fiskirættindum gevur somu avbjóðingar sum ein miðsavning av marknaðarpørtum í vøru ella tænastuvinnum. Tær seinnu geva tær avbjóðingar, at kappingin millum fyritøkur kann verða skúgva til viks, antin tí at ein ella nakrar fáar fyritøkur fáa vald yvir marknaðinum, ella tí at marknaðarbygnaðurin broytist soleiðis, at tað gerst lættari at samskipað ella beinleiðis avtala atburð millum fyritøkur.

Í sambandi við loyvini er talan um áramálsett brúksrættindi, sum verða ella fara at verða seld á uppboðssølu. Tað kann verða torført at síggja, hvussu ein sum situr á stórum parti av loyvunum skal kunna gera sína ávirkan galdandi á aðrar loyvishavarar, ella á fiskakeyparar.

Ein loyvishavari, sum hevur keypt sær stóran prosentpart av tøku fiskirættindunum kann ikki brúka nakran monopolmakt til at avmarkað útboðið av fiski, fyri harvið at tvinga fiskaprísin upp. Orsøkin er, at fiskidagar ella kvotur kunnu sum meginregla ikki flytast millum ár, og tað er harumframt avmarkað, hvussu longi fiskur kann goymast, bæði tí hann spillist, og tí at tað er dýrt at hava hann á goymslu. Fer fiskaprísurin upp orsakað av at ein loyvishavari hevur keypt stóran part av veiðurættindunum og samstundis hevur avmarkað útboðið av fiski, so verða tað fleiri sum bjóða uppá fiskirættindi á uppboðssølu, tí ein høgur søluprísur á fiski ger tað meira attraktivt at keypa fiskirættindi. Tískil kann ein loyvishavari ikki varðveita sína marknaðarmakt í longri tíð.

Í sambandi við viðgerð av eina samanlegging eftir kapitul 5 í kappingarlógini vil Kappingareftirlitið innsavna dáta til at útrokna marknaðarpartar og miðsavning[3]. Hesi tøl kunnu geva ábending um, hvørt samanleggingin kann skapa kappingarligar trupulleikar, og tí krevur eina størri kanning.

Kappingareftirlitið vildi ikki sýtt fyri eini samanlegging, bara grundað á ein marknaðarpart ella hvussu miðsavnaður ein marknaður er. Í teimum førum har marknaðarpartur ella miðsavning geva ábending um kappingarligar trupulleikar, verður størri kanning sett í verk fyri at fáa staðfest um samanleggingin skal sýtast, góðkennast, ella góðkennast við treytum. Skal samanleggingin góðkennast við treytum ella sýstast, skal tilmælið um avgerð sendast til hoyring hjá luttakandi feløgunum. Síðani verður avgerðin løgd fyri Kappingarráðið. T.d. vóru treytir settar, tá ið Bakkafrost yvirtók Vestlax og síðani Havsbrún.

Orsøkin til at samanleggingar, har antin marknaðarpartar ella miðsavningin verður stór, kortini við hvørt verða góðkendar er, at man eftir kappingarreglum ikki vil sýta transaktiónum, sum geva samfelagnum eitt positivt íkast. Tí tað nyttar lítið við kapping, um prísurin er at vinnan verður hildin føst í einum ineffektivum vinnumynstri.

Havast skal í huga, at ein samanlegging ofta fer fram, tí at keyparin virðismetir ognina hægri enn seljarin. Ofta kann tað verða rakstralig viðurskifti ella vitan sum gera, at keyparin kann fáa størri virðir úr ognini, enn seljarin kann. Hetta gevur eisini samfelagnum eitt positivt íkast.

Í ljósinum av hesum, so tykjast ætlanirnar um at seta eitt evsta mark á 17,5% sum eitt rættuliga stórt inntriv, sum stríðir ímóti evropeiskari rættarprakis og ikki er grundað á royndir ella búskaparfrøði.

---

[3] Í evropeiskum kappingarrætti er rættarpraksis fyri, at ein marknaðarpartur á 50% ella meir í sær sjálvum er ein ábending um, at ein samanlegging kann føra til kappingarligar trupulleikar. Marknaðarpartar millum 50% og 40% kunnu eisini hava við sær kappingarligar trupulleikar, um onnur viðurskifti tala fyri tí, sum t.d. tal av kappingarneytum á marknaðinum. Marknaðarpartar á 25% ella minni eru sambært evropeiskari rættarpraksis ein ábending um, at ein samanlegging ikki førir til kappingarligar trupulleikar.
Tá tað kemur til miðsavning, so verður HHI (Herfindahl-Hirschman indeksi) brúkt sum mát fyri miðsavning. Er HHI millum 1000-2000 og ein broyting undir 250 verður hetta tikið sum ábending um, at ein samanlegging ikki fer at skaða kappingina. Er HHI 2000 ella meira, men broytingin bert er 150, so er tað eisini ein ábending um, at ein samanlegging ikki fer at skaða kappingina.

Kappingareftirlitið metir, at anti-trust reglurnar eiga at verða linkaðar munandi, ella heilt avtiknar.

Tað eru aðrar reglur í lógaruppskotinum, sum tryggja, at ein sum kemur at sita á stórum parti av tilfeinginum, ikki fer at kunna skaða kappingina. Í fyrsta lagi er talan ikki um ognarskap yvir rættindunum, men um brúksrætt. Við brúksrættindunum fylgir ein brúksskylda, tí sambært §34, stk. 1 fella rættindi sum ikki eru brúkt aftur til landið. Sama grein sigur, at um bert 30% ella minni av einum rættindi er brúkt, verður munur fluttur yvir til landi aftur. Afturat hesum verður galdandi, at rættindi, har minni enn 60% eru brúkt árið fyri, kunnu sambært §§35-36 ikki avhendast. Skulu rættindi avhendast, er krav um almenna sølu.

Spurningurin er tí, um ikki tað hevði verið gagnligt fyri fiskivinnuna og føroyska samfelagið sum heild, um anti-trust reglurnar vórðu avtiknar, soleiðis at ein natúrlig miðsavning kundi farið fram í vinnuni. Afturímóti hesum kundu so umsitingarætlanirnar frameftir bara tikið støði í, hvat er lívfrøðiliga burðardygt. Fær vinnan møguleika at leggja saman í størri eindir, eru eisini størri sannlíkindi fyri, at endamálið í lógini um størri virðisøking verður rokkið.

**1.4. Útlendskur ognarskapur**

Í lógaruppskotinum verður ásett, at ongin útlendingur kann eiga í føroyskari fiskivinnu. Hetta ein herðing ímun til verandi lóg, ið loyvir, at 1/3 av partabrøvunum í einum felagið eru á útlendskum hondum. Endamálið verður sagt at verða at tryggja, at avkastið av fiskitilfeinginum kemur samfelagnum til góðar, at forða fyri, at stýringin og ræðið á fiskiflotanum verður flutt til útlandið, og at tryggja, at strategiskar avgerðir viðvíkjandi fiskiflotanum verða tiknar út frá atlitum, sum gagna føroysku fiskivinnuni.

Tað er sjálvsagt viðkomandi, at avkastið av fiskitilfeinginum kemur samfelagnum til góðar, og at ognarskapurin yvir tilfeinginum verður verðandi á føroyskum hondum. Spurningurin er tó, um ikki hesi viðurskifti er nøktandi tryggjað í øðrum ásetingum í lógaruppskotinum. Tað er ásett í lógini, at tilfeingið er ogn føroya fólks, og at rættindini eru tíðaravmarkað brúksrættindi. Tað er somuleiðis ásett, at øll avhendan av veiðirættindum skal umvegis almenna sølu ella almenna uppboðssølu, og at tann partur av rættindunum, sum ikki verður seldur á uppboði, skal áleggjast tilfeingisgjald. Tvs. at lógin hevur ásetingar, sum tryggja føroyska samfelagnum eitt avkast. Hartil kemur, at føroysk partafeløg rinda føroyskan felagaskatt uttan mun til um útlendingar eiga partapeningin.

Okkum kunnugt hevur hvørki Fiskimálaráðið ella nakar stovnur undir Fiskimálaráðnum staðfest, at nakrir trupulleikar eru við útlendskum ognarskapi í fiskivinnu. Tað er tí undrunarvert, at ásetingin um útlendskan ognarksap verður herd nú, tá ið hugsa verður um at partar av flotanum eru fíggjarliga illa fyri.

Tað eru fleiri meinbogar við at herða ásetingina. Atgongdin hjá føroyskum feløgum til annan kapital enn lánskapital verður avmarkað, og kann hetta hava við sær at kapitalkostnaðurin hækkar. Endamálini í lógaruppskotinum um størri virðisøking verða eisini torførari at gjøgnumføra uttan møguleika fyri útlendskum ognarskapi.

Tað er hinvegin ov einfalt, at síggja útlendskan ognarskap í føroysku fiskivinnuni bara sum eina fíggjarkeldu. Útlendskur ognarskapur kann eisini geva føroysku fiskivinnuni know-how, betri atgongd til sølulið v.m.

Royndir frá føroysku alivinnuni vísa eisini, at tað kann verða torført at halda fast um eitt forboð ímóti útlendskum ognarskapi, tá ið vinnan er í kreppu. Tað vísir seg oftani, at herðingar fara fram í góðum tíðum, meðan krøvini verða slept í ringum tíðum. Úrslitið er, at útlendskir íleggjarar fáa atgongd til vinnuna, tá í partapeningurin í vinnuni hevur minst virði, og føroyskir íleggjarar ikki sleppa at selja til útlendingar í góðum tíðum, tá ið partapeningurin hevur størst virði.

Tá hvørki Fiskimálaráðið ella nakar annar myndugleiki hevur staðfest trupulleikar av útlendskum ognarskapi í føroysku fiskivinnuni, og havandi í huga teir fyrimunir sum útlendskar íløgur í fiskivinnuna geva, og havandi í huga hvussu fíggjarliga støðan er í pørtum av flotanum, hevði verið betur um ætlanirnar um at sýta útlendskum ognarskapi vóru sleptar, og verðandi avmarking var broytt frá 33% til 49%.

**2. Samanumtikið**

Kappingareftirlitið vil mæla til fylgjandi broytingar í uppskotinum:

**Umsitingarætlanir:** Tær umsitingarætlanir, sum skulu gerast fyri hvørt fiskislag, skulu bara taka støði í, hvat er lívfrøðiliga ráðiligt, tí hetta gevur størst møguligt langtíðar avkast fyri fiskivinnna og føroyska samfelagið.

**Umsitingin**: Áseting av lívfrøiliga burðadyggari veiðu, og útboð ella tillutan av fiskirættindum og umsiting av loyvum, eiga at verða løgd uttanfyri aðalráðið.

**Fiskivinnan skal hava rásarúm til at virka undir lívfrøðiligu kørmunum:** Feløg í fiskivinnuni skulu hava betri møguleikar at vaksa um sítt virksemi. Samanleggingar og yvirtøkur skulu bert metast eftir reglunum í kap. 5 í kappingarlógini.

**Ongar anti-trust reglur:** Ætlanin um at seta ognaravmarking á ávikavist 17,5% fyri øll fiskirættindi og 20% fyri høvuðsbólkarnir merkir uttan iva, at fleiri yvirtøkur og samanleggingar, sum annars vildu kunnað givið samfelagnum eitt størri avkast, kunnu ikki gjøgnumførast. Mælt verður til at sleppa øllum ætlanum um ognaravmarkingar, tí í kappingarlógini eru nøktandi heimildir til at tryggja eina virkna kapping í fiskivinnuni. Verður hildið fast um hesar ætlanir, verður mælt til ein avmarking sum ikki verður lægri enn 40-50% fyri at avmarkað neiligu árini av mørkunum.

**Fleiri íløgur frá útlendskum kapitali:** Heldur enn at seta bann fyri útlendskum kapitali, so eigur áseting at verða sett, sum loyvir útlendskum íleggjarum at eiga 49% av føroyskum feløgum. Skulu endamálini í lógini um meira virðisøking og eina effektivari vinnu røkkast, er neyðugt við íløgum. Havandi í huga, at føroyskir myndugleikar enn ikki hava staðfest nakrar trupulleikar við útlendskum eigaraskapi í føroysku fiskivinnuni, so tykist ein herðing at vera óneyðug.

Vegna Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson, deildarstjóri